# Verkætlanarstarv

Granskingarráðið bjóðar áhugaðum at søkja starv sum verkætlanarsett at gera hagtøl fyri gransking, menning og nýskapan innan alment og privat

Tíðarskeiðið fyri verkætlanina er 1 ár og byrjað verður í august 2003 ella eftir nærri avtalu.

Arbeiðsstaður verður á Hagstovu Føroya.

### Verkætlanarlýsing

Innsavningin og viðgerðin av hagtølunum skal gerast eftir slíkum leisti, at hagtølini eru álítandi, heildarumfatandi og altjóða sambærilig.

### Verkætlanin verður ætlandi í fýra stigum:

1. Grundbygnaður
2. (Forriting – Hagstova Føroya)
3. Datainnheinting
4. Greining

**Fyrsta stigið** - grundbygnaðurin - er m.a. at seta mørk og lýsa hugtøk viðvíkjandi teimum skrásetingum, sum skulu gerast. Hvat er gransking, menning og nýskapan, hvussu skulu hugtøkini avmarkast í praktisku mátingini, hvussu skal flokkast, hvørjar flokkingar av virkjum og stovnum, útbúgvingum og granskingarevnum skulu brúkast, hvat skal teljast - heilársstørv, innanhýsis og uttanhýsis fígging o.s.fr.

Fyrsta stigið fevnir eisini um at gera sjálvan datamyndilin, sum skal liggja sum grund undir forritingararbeiðinum.

**Annað stigið** - forritingina - fremur Hagstova Føroya.

**Triðja stigið** – datainnheintingin - er at skriva spurnabløðini, og harumframt at fara út til stovnar og fyritøkur at leiðbeina svararunum, soleiðis at svarini eru so rættvísandi sum til ber. Tað er neyðugt, fyrstu ferð kanningin verður framd, at greiða gjølla frá spurnablaðnum og at fáa sær royndir av, hvussu spurnabløðini virka.

**Fjórða stigið** – greiningin - er at skriva eina frágreiðing, sum lýsir støðuna við lyklatølum og myndum, umframt eina samanbering við onnur lond.

Á øllum stigum verður dokumentasjón skrivað.

### Umsøkjarin skal hava

§ hóskandi útbúgving frá hægri lærustovni
§ góðan málsligan førleika
§ góð samstarvsevni og evni at arbeiða sjálvstøðugt

### Setanartreytir

Ein stýrisbólkur hevur umsjón við verkætlanini.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag.

Umsókn við prógvum, c.v. og møguligum viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 27. juni 2003.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Rúnu Hilduberg, stjóra, á tlf. 316515 ella telduposti gransking@gransking.fo

**Granskingarráðið hevur tvey høvuðsarbeiðsøki**
· Ráðgeva landsstýri og vinnu í granskingarpolitiskum spurningum.
· Umsita Granskingargrunnin, sum veitir fígging til granskingar- og menningarverkætlanir.

granskingarráðið
THE FAROESE RESEARCH COUNCIL

Granskingarráðið · Bryggjubakki 12 · Postrúm 259 · FO-110 Tórshavn
tlf. 316 515 · gransking@gransking.fo · www.gransking.fo

SANSIR 355 355

# Bygningur hjá Hydro Tech PF til sølu



Um hóskandi boð fæst er framleiðslubygningurin hjá Hydro Tech á Eiði til sølu.

Samlaða gólvvíddin er 1200 m² (30 x 40 m). Av hesum eru 200 m², í tveimum hæddum, nýtt til goymslu, skrivstovu, fundarhøli, umklæðingarhøli og matarhøli.
Í høllini eru monteraðir tveir 5 tons traverskranar. Arbeiðshæddin er 8 m.

Áhugað kunnu venda sær til Ólav Asafsson Olsen á skrivstovuni hjá KJ-Hydraulik á Kambsdali, tlf. 444170 frá kl. 08.00 til 16.00, ella senda ein teldupost til: oao@kj-hydraulik.com

# Útbjóðing

Í sambandi við bygging av **Eldrasambýli fyri Gøtu Kommunu** verður arbeiðið hervið boðið út í almenna lisitatión.

Høvuðsarbeiðstøkan fevnir um:
- Timbur- og snikkaraarbeiði
- Múraraarbeiði
- HVS-arbeiði
- El-arbeiði

Lisitatiónin verður í kommunuskrivstovuni í Gøtu hósdagin 17. juli 2003.

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast í seinasta lagi 30. juni 2003 á Teknistovuni í Gøtu við at gjalda kr. 5.000,- í veðhaldi á konto 6460-165 7404 í Føroya Banka.
Veðhaldið verður afturgoldið, tá útbjóðingartilfarið er aftursent í seinasta lagi eina viku eftir lisitatiónina.

**sp/f Teknistovan**
v. Jens Kl. Jacobsen og Henning Olsen,
ráðgev. byggifrøðingar
FO-510 Gøta
tel. 442105 - fax. 442107
e-mail: klement@post.olivant.fo

# Luftkompressari

200 l, til sølu fyri 2.500 kr. Er brúktur.

**Norð Trukk**
Mykinesgøta 3
100 Tórshavn
Tlf. 315136

## BILAR TIL SØLU

**BMW 318i st. car**
Ár. 06 - 1997
Nógv útgerð s.s. klima, el-rútar, sóltak o.a

**Citroen Xantia Turbo Diesel**
Ár. 03 - 1996

**Mazda 626**
Ár. 1989

**Audi A6 2,5 TDI automatic v.m**
Galvaniseraður
Ár. 1994

**BMW 525 2,5 tds Diesel**
Ár. 07 - 1996 aut · Tlf. 51 77 04

**Nissan Bluebird**
Ár. 10 - 1987

**Mitsubishi Galant**
Ár. 06 - 1991

**Vit hava 50cc Vespa Piaggio skutarar á goymslu**

Úrvalsbilar Spf.
530 Fuglafjørður
tel. 444943 · fax 444638 · far. 217704








ARMRING


Strongd - cirkulatión svøvnloysi
siri
liv & heilsa
Dr. Jacobsensgøta 18
FO 100 Tórshavn
Telefon 31 66 10 • Fax 31 66 10


Sosialurin
Sosialurin
i



## *Heilsuútbúgvingin á Tvøroyri*

**Søkt verður eftir**

# lærara

**til Heilsuútbúgvingina á Tvøroyri at byrja 01.09.2003**

Starvið er 1/2 avloysarastarv og tíðaravmarkað til 31.12.2003. Setanin kann møguliga halda fram sum fulltíðar avloysarastarv til 30.06.2004.

Starvið umfatar undirvísing og tilrættalegging av heilsuhjálparaútbúgvingini.

**Krøv til umsøkjara:**
Miðallong framhaldsútbúgving, sum er viðkomandi fyri útbúgvingina, t.d. sjúkrarøktarfrøðingur, fysio- ella ergoterapeutur e.l. Umsøkjarar við námsfrøðiligari ella aðrari eftirútbúgving ella viðkomandi skeiðum hava fyrimun.

Talan er um eitt spennandi og mennandi starv, har tú arbeiðir sjálvstøðugt í tínari undirvísing. Undirvísingin er løgd til rættis sum toymisarbeiði og sum verkætlanir í tøttum tvørfakligum samstarvi við hinar lærararnar á skúlanum.

Undirvísingin tekur støði í hesum 5 yrkislærugreinunum: Handalig, mentanarlig, námsfrøðilig/sálarfrøðilig, almenn / samfelagslig og røkt við 20% úr hvørjari grein.

Í heilsuútbúgvingini starvast frammanundan ein sjúkrarøktarfrøðingur, ein kostráðgevi og ein fysioterapeutur.

Løn og treytir sambært avtalu millum avvarðandi fakfelag og fíggjarmálaráðið.

Upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til **deildarleiðaran fyri heilsuútbúgvingina, Susanne Høgh Olsen á tlf. 372855.**

Umsóknir skulu sendast til:

**Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya**
att: Bergliot Ihlen, rektari,
Eirargarður 14 B,
FO-100 Tórshavn

og skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi mánadagin 14. juli 2003 kl. 14.00.

# Hjálparfólk til røkt heima

Eini eldri hjún, har sjúka er komin inn í tilveruna, sóknast eftir røskum og væl at sær komnum fólki, til røktarhjálp í heiminum.

Talan er um ansan við avtalaðari arbeiðstíð. Heimligu viðurskiftini eru sera góð.

Áhugað kunnu venda sær til og fáa fleiri upplýsingar á telefon 311658.

# Sunda kommuna søkir

**2 dagrøktarar** at byrja 11. august.

Dagrøktarheimið skal vera innrætta barnavinarligt, har rúm er til børnini at spæla í og hóskandi trygt spælioki uttanfyri.

Skipanin er nýggj, og er hetta bert ein fyribilsloysn til tann nýggji stovnurin verður klárur um umleið 2 ár.

Lønin er sambært sáttmála við Føroya Kommunala arbeiðsgevarafelag.

Bygdaráðið tekur sær rætt til frítt at velja ímillum umsóknirnar og ella ongan at seta.

# Til Dagstovnin á Oyri

1 pedagog 30 tímar um vikuna, at byrja 11. august 2003. Starvið er í vøggustovu við 15 børnum 0-3 ár.

1 pedagog 35 tímar um vikuna, í eitt barnsburðaravloysarastarv, at byrja 1. september 2003. Starvið er í Stórustovu við 18 børnum í aldrinum 5-7 ár.

1 hjálparfólk 20 tímar um vikuna, frá 11. august 2003 og til 15. februar 2004. Starvið er í Stórustovu við 18 børnum í aldrinum 5-7 ár.

Dagstovnurin er normeraður til 42 børn, sum er uppdeild í 3 bólkar, við 1 vøggustovu og 2 barnagarðsstovur.

Vit liggja í náttúruvinarligum umhvørvi við haga og fjøru og leggja stóran dent á at nýta hetta í gerandisdegnum.
Vit ynskja, at tú saman við okkum kann skapa ein ríkan og mennandi gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrum og starvsfeløgum

Um ongin pedagogur søkir verður hjálparfólk sett fyribils.

Lønar- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum kommunalu arbeiðsgevarafeløgini og Føroya Pedagogfelag.

Nærri upplýsingar um størvini, fáast við at venda sær til leiðaran Rosu Prestá á tlf. 422552, lokal 10 ella varaleiðaran Sólrún Dam á tlf. 422552, lokal 11.

Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skulu verða stovninum í hendi í seinasta lagi 3. juli 2003.

SUNDA KOMMUNA

**Dagrøktastovurin á Oyri**
450 Oyri
tlf. 422552 - Fax. 422632

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

# Tekniski Skúlin í Tórshavn søkir lærarar

**Av tí, at ov fáar umsóknir vóru til størvini, verður lýst av nýggjum**

**Lærari til el-deildina**
Starvið, sum er eitt **fulltíðarstarv**, umfatar undirvísing á el-deildini.

Umsøkjarin skal hava sveinabræv sum elektrikari, hava prógv sum el-installatørur og minst 2 ára starvsroyndir innan yrkið. Neyðugt er at umsøkjarin hevur kunnleika til nýggjastu el-útgerð. Eisini er áhugi fyri stødd-, alis- og evnafrøði, og nýtslu av EDV, ein fyrimunur.

*Á el-deildini starvast 5 lærarar í føstum starvi og 1 verkstaðarhjálpari. Nemingarnir læra til elektrikara og ganga í skúla í 55 vikur tilsamans. Eisini verða SIT-næmingar undirvístir á deildini.*

**Lærari til timburdeildina**
Starvið, sum er eitt **fulltíðarstarv**, umfatar undirvísing á timbur- og snikkaradeildunum.

Umsøkjarin skal hava sveinabræv sum húsasmiður, og minst 2 ára starvsroyndir innan yrkið. Umsøkjarar við hægri útbúgving hava fyrimun.

*Timbur-og snikkaradeildinar eru í sama bygningi. Lærarnir skifta ímillum báðar deildirnar.*
*Á deildunum starvast 8 lærarar í føstum starvi og 1 verkstaðarhjálpari. Næmingarnir læra til húsasmið ella bygningssnikkara og ganga í skúla ávikavist 45 og 50 vikur tilsamans. Á deildini verða eisini SIT næmingar undirvístir.*

**Setanarkor til fast starv:**
Fyrstu 2 árini verða roknað sum royndartíð, har tann, sum verður settur í fast starv, má vera til reiðar at taka ta eftirútbúgving, tað verður seg pedagogiska/undirvísingarliga ella aðra førleikagevandi útbúgving, sum er neyðug fyri at verða settur í fast starv.

**Løn:**
Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Landstýri og FTL.

Størvini skulu setast 11. august 2003.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving, viðmælum og starvstíð skal vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 26. juni 2003.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til skúlan, tlf. 31 19 57

**Tekniski Skúlin í Tórshavn**
Marknagilsvegur 75 • P.o.b. 239 • FO - 110 Tórshavn
Tlf: 31 19 57 • Fax: 31 66 21 • E-mail: tst@ tst.fo

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo